

# 7000 milliardir kr. meira til Norra við betri tøkni

**Jan Müller**

24.10.2013 - 08:41

Oljan.fo

Størri brúk av tøkni kann hjálpa norðmonnum at fáa upp virði úr undirgrundini fyri fleiri túsund mia. kr. Hetta skrivar aftenbladet.no.

"Um so er, at vit megna at taka í nýtslu tøkni av ymsum slag umframt at menna nýggja tøkni, kunnu vit fáa olju og gass upp úr norsku undirgrundini fyri 7000 mia. kr.," segði Sigmund Stokka, leiðari fyri stovni, ið stendur fyri øktari oljuútvinning gjøgnum betri bori- og brunntøkni.
Hann segði hetta fyri ungum norðmonnum, sum útbúgva seg innan tøkni, á Offshore Technology Days (OTD) ráðstevnuni i Stavanger Forum mikudagin.
Sambært Stokka liggja 54% av samlaða tilfeinginum á norska landgrunninum framvegis í undirgrundini. Um tað eydnast at økja um útvinningina, tvs. tað, sum fæst upp úr goymslunum, uppá einans 1%, ber til at fáa olju og gass upp úr undirgrundini, sum svarar til eitt virði uppá 500 milliardir kr.

Men tørvur er á týðandi íløgum, skal tað eydnast at fáa oljuna og gassið upp. Og hesar íløgur skulu gerast í m.a. boritøkni og boriútgerð.

Stokka sigur, at tað verða boraðir ov fáir brunnar á norska landgrunninum í dag, og at betri tøkni fer at minka um útreiðslurnar, sum eru knýttar at bora ein brunn. Og tá verður eisini møguligt at bora fleiri brunnar.

Stovnurin, sum Stokka stendur á odda fyri, er eitt samstarvsprojekt millum fleiri norska stovnar eitt nú Iris á Ullandhaug, lærda háskúlan í Stavanger og Sintef og NTNU í Trondheimi.

Í løtuni arbeiða 310 granskarar á stovninum, sum ger íløgur uppá 500 mill. kr. I gransking innan olju og gass um árið. Stovnurin lat upp í 2010.
“Málið er at finna loysnir uppá, hvusu vit kunnu fáa upp tað eyka tilfeingið, sum finst á norska landgrunninum, við at brúka eina betri hóskandi bori- og brunntøkni,” sigur Stokka.
Og hann leggur aftrat, at granskarar í samstarvi við oljufeløgini megna at menna betri ta betri tøknina.
Stovnurin, sum hann stendur á odda fyri, fær fleiri milliónir kr. í stuðuli frá oljufeløgum sum Statoil, Total, ConocoPhillips, Wintershall og Talisman